**KOMMUNALA ARBEIÐSGEVARAFELAGIÐ**

**OG**

**STARVSMANNAFELAGIÐ**

**SEMJA**

Partarnir eru samdir um, at gera fylgjandi broytingar í sáttmálanum:

**1. Sáttmálaskeiðið**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2003 til 1. oktober 2005.

**2. Almennar lønarhækkingar**
Lønin hækkar:
1. oktober 2003 hækkar lønin 2,9%
1. oktober 2003 hækkar lønin 2,9%

**3. Eftirlønargjald**
1. oktober 2003 verður eftirlønargjaldið 9%
1. oktober 2004 verður eftirlønargjaldið 10%

**4. Arbeiðstíðin**
Arbeiðstíðin verður frá 1. oktober 2003 at rokna 39 tímar um vikuna. Mattíðin verður fyri fulltíðarsett 2,5 tímar um vikuna.

**5. Avtala um serstakar frídagar**
Ein upphædd, svarandi til 1% av lønarsumminum pr. 1. oktober 2003, verður nýtt til serligar frídagar. Sáttmálafrídagarnir fella burtur frá 1. januar 2004, men nú kunna starvsfólk vinna sær eina fríviku eyka. Innvinningin fer fram sum tá starvsfólk vinna sær frítíð eftir frítíðarlógini. Avtalan er liðilig, soleiðis at fólk, sum ikki vilja hava frídagarnar, í staðin kunna fáa teir útgoldnar. Virðið á einum frídegi er tá ½ % av einari ársløn.

**6. Liðilig Arbeiðstíð**
Partarnir hava endurskoða reglurnar um arbeiðstíð. Á einstaka arbeiðsstaðnum verður avtalað, yvir hvussu langa tíð, arbeiðstíðin verður gjørd upp. Tað kann t.d. vera ein vika, fýra vikur ella tveir mánaðir.
Áseting er eisini gjørd um sjálvboðið eykaarbeiði.

**7. Førleikamenning**
Partarnir hava avtalað at fara undir strategiska og skipaða førleikamenning.

**8. Aðrar broytingar**
Ásetingin um 4% til tímalønt er strikað. Hvítusunnuaftan er ikki longur fastur frídagur. Vaktargjøld fyri kvøld- og náttararbeiði verður nú goldið í tíðini frá 17 til 07. Avtalað er, at fólk verða drigin í løn tíma fyri tíma, tá ið tey hava tænastufrí við ongari løn.

**9. Sløkkiliðsmenn**

a) Fyri at kava verður latin ein eyka samsýning uppá kr. 80,00 um tíman.
b) Fyri útkalling verður latið útkallingargjald og yvirtíð eftir lønarsáttmálanum.
c) Vaktargjald verður 10% av mánaðarlønini eftir lønarflokki 3, 1. stig (stig 7)

**10. Dagrøktarar**
Dagrøktarar kunna fáa frí við løn, tá barn/børn teirra eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar árliga.

Tórshavn, hin 24. november 2003

| **Starvsmannafelagið** | **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið** |
|---|---|
| Gunnleivur Dalsgarð / Anna Johannesen | Jan Christiansen |
| Heini Joensen | Johanna Maria Pedersen |
| Súni Selfoss | |
| Selma Ellingsgaard | |
| John Kjær | |